# ítróttur

Nr. 52 • mikudagur • 16. mars 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Rógvi skoraði fyri KR

**Einasti føroyingurin í íslendskum fótbólti, Rógvi Jacobsen, var á rætta staðnum, tá ið KR mánakvøldið vann 3-0 á ÍA**

ÚTISETA MÁL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Føroyski landsliðsleikarin Rógvi Jacobsen var á blettinum fyri lið sítt KR, tá ið teir mánakvøldið vunnu 3-0 á ÍA av Akranesi í venjingardysti.*

*savnsmynd*

Talan var um ein venjingardyst millum KR og gamla felagi hjá Julian Johnsson, ÍA av Akranesi, sum var fingin í lag, tí at tveir útlendskir spælarar í hesum døgum eru til royndarvenjingar í KR.

**Fyrsta málið hjá Rógva í KR**

Teir báðir útlendingarnir, sum í løtuni royndarvenja í KR, eita ávíkavist Helmis Matute og Mychal Turpin, og teir eru ávíkavist verjuleikari og miðvallari.

Rógvi myndaði saman við Arnar Gunnlaugsson álopið hjá KR, og álopsfelagin legði KR á odda, tá ið eitt lítið korter var farið av dystinum.

Í seinna hálvleiki gjørdi føroyski landsliðsmaðurin vart við seg, tá ið hann átta minuttir eftir steðgin var hægstur og stútaði bóltin í netið til 2-0. Hetta er fyrstu ferð, at Rógvi hevur skorað fyri KR, síðani hann fór til Íslands, og tað kemur óivað væl við hjá klaksvíkinginum, at hann endiliga fær víst sítt máltev í Íslandi.

Stutt eftir málið hjá Rógva legði Arnljótur Ástvaldsson KR á odda 3-0, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið av dystinum.

# Kyndil vunnið bæði gentur og dreingir 10 ár

*Kyndil - gentur 10 ár føroyameistarar: Guðrið Eystberg, Turið Arge, Kirstin í Garði, Rannvá Egholm, Gunnvør Brekkstein, Annika Sigurdsdóttir, Sissal Skaale, Sára Sondum, Sissal Samuelsen og Elin Carlsson. Venjarar eru Sólva Eystberg og Birgir Sondum*





Meðan tað ikki hevur hilnast serliga væl hjá Kyndil í fremstu vaksnamannadeildunum, so hevur tað tó gingið stak væl hjá yngru liðunum.

Havnarfelagið hevur nevnliga vunnið bæði gentu- og dreingjadeildina hjá teimum 10 ára gomlu.

Dreingjaliðið hevur vunnið deildina triðja árið á rað, og tað má sigast at verða eitt sera gott avrik. Í gentudeildini er tað hinvegin so, at talan er um fyrsta meistaraheitið hjá Kyndil í gentur tíggju ár í ellivu ár og bert tað triðja í søguni.

**tn**

*Kyndil – dreingir 10 føroyameistarar: Andrias Eriksen, Magnus Egilsson, Eirikur Simonsen, Ári Mohr Danielsen, Eli Nolsøe, Kjartan Nielsen, Bogi Sørensen, Rani Kyster og Johan Hansen. Venjari er Lotte Sørensen*

## Úttøkuvenjing til U15-landsliðið

Venjararnir hjá føroyska U15-landsliðnum í fótbólti, Mathias Davidsen og Eli Hentze, hava boðsent 22 dreingjum til úttøkuvenjingar á Toftum komandi sunnudag.

Teir 22 dreingirnir eru hesir: Heini Vatnsdal VB, Gilli Sørensen TB, Christin R. Mouritsen, Gunnar Thomsen, Tummas Juul Thomsen HB, Róaldur Jacobsen, Ámund Hansen, Cristian í Garði B36, Arnar Dam ÍF, Jóan Símun Edmundson, Remi Langaard B68, Viljormur Davidsen, Karl Løkin, Monrad H. Jacobsen NSÍ, Jens M. Jensen EB/ST, Hans Jørgensen SKÁLA, Kaj Leo í Bartalsstovu GÍ, Henning S. Joensen MB, Andrias Ellingsgaard, Daniel H. Dam, Jan Elmar Sørensen, Sørmundur Kalsø .

**tn**

## Avgreiðast í vikuni

**Útsettu dystirnir í kappingini um Løgmanssteypið skulu avgreiðast í hesi vikuni, hevur Fótbóltssambandið gjørt av**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Allir tríggir dystirnir, sum skuldu verða farna vikuskifti í kappingini um Løgmanssteypið, skulu fáast frá hondini í hesi vikuni, so at tað ikki ávirkar næsta umfar, sum skal spælast komandi vikuskifti.

**Dómarin tekur avgerðina**

FSF hevur gjørt av, at dystirnir skuldu spælast í gjárkvøldið, um líkindi vóru til tess. Um mett var, at tað ikki var gjørligt at spæla týskvøldið, skulu dystirnir avgreiðast í kvøld. Ber hetta heldur ikki til, verða dystirnir fluttir til í annaðkvøld.

Tað er dómararnir í teimum ymisku dystunum, sum tekur avgerðina, um tað er ráðiligt at spæla dystirnar ella ikki.

Teir fýra útsettu dystirnir eru: LÍF-AB, SÍ-FS Vágar 2004 og NÍF-Fram.